## UTTAN ÚR HEIMI

## Ætlaðu atsókn at flogfari

Myndugleikarnir í Saudiarabia hava tikið tveir menn, sum eru undir illgruna fyri at hava ætlað at stoyta eitt lítið flogfar ímóti einum fullsettum ferðamannaflogfari hjá bretska flogfelagnum British Airways.

Bretska blaðið The Mail on Sunday skrivar, at saudiarabisku myndugleikarnir hava einki sagt um handtøkuna, tí teir royna at dylja hana, og ein talsmaður hjá myndugleikunum avsannar eisini, at teir báðir menninir eru tiknir. Men ein bretskur politikari sigur við blaðið, at hann frá álítandi keldum hevur fingið váttað, at tíðindini eru sonn.

Bretska uttanríkisráðið vil ikki gera viðmerkingar til tíðindini í The Mail on Sunday. British Airways hevur heldur ongar viðmerkingar, men tað hevur flogfelagið ongantíð, tá tílík tíðindini verða borin.

## Valstríðið fingið neytaøði

Tilburðurin, tá amerikonsku myndugleikarnir stutt fyri jól staðfestu neytaøði hjá einari kúgv í statinum Washington, fær nú ávirkan á valstríðið upp undir forsetavalið næsta ár.

Eitt av teimum demokratisku valevnunum, Howard Dean, leggur nú George W. Bush, forseta og stjórnina undir at hava slept amerikonsku bøndrunum upp á fjall. Hann sigur, at amerikanska stjórnin átti at havt lært av teimum ovurstóru trupulleikunum, sum neytaøði elvdi til í Bretlandi í nítiárunum, men at stjórnin hevur snorksovið.

Tollaksmessudag staðfestu amerikanararnir fyri fyrstu ferð neytaøði í USA. Talan var um eina kúgv í statinum Washington við Kyrrahavið, og illgruni er um, at sjúkan er komin úr Kanada. Síðani sjúkan varð staðfest, hava 30 lond sett bann fyri at innflyta kjøt úr USA.

## Berger vann

Tann konservativi Oscar Berger vann forsetavalið í Guatemala sunnudagin. Sambært valnevndini fekk hann umleið 56 prosent av atkvøðunum.

Oscar Berger hevur fyrr verið borgarstjóri í høvuðsstaðnum Guatemala City, og hann fekk eisini 64 prosent av atkvøðunum har. Undir valstríðnum hevur hann lovað at beina fyri rasuskilnaðinum í Guatemala og at bøta um tey búskaparligu viðurskiftini. Tað eru serliga stórbøndurnir og vinnulívið, sum hava stuðlað Berger undir valstríðnum. Uppteljingin sunnukvøldið vísti, at Oscar Berger hevði fingið flestu atkvøðurnar í øllum teimum stóru býunum, meðan mótvalevnið, tann vinstrasinnaði Alvaro Colon, fekk flestu atkvøðurnar á bygd.

Hetta er aðru ferð síðani 1996, at forsetaval er í Guatemala. Tá endaði eitt 36 ára langt borgarakríggj, sum kravdi meiri enn 200.000 mannalív. Umleið 80 prosent av teimum, sum doyðu í borgarakrígnum, vóru indiánar.

## Ikki eitt kis frá Beagle

Hóast fleiri royndir hevur eingin hoyrt eitt kis frá evropeiska rúmdarfarinum Beagle 2, sum fyri nøkrum døgum síðani lendi á gongustjørnuni Mars.

Leygardagin var amerikanski fylgisveinurin "Mars Odyssey" uppi yvir staðnum, har "Beagle 2" lendi, men hann kundi ikki fáa samband við evropeiska farið. Heldur ikki tann stóra støðin í Jodrell Bank í Onglandi hevur kunnað fingið samband við hann. Næsta royndin verður ætlandi gjørd tann 4. januar, tá móðurfarið "Mars Express" verður uppi yvir lendingarstaðnum.

Ein talsmaður hjá evropeiska rúmdarsamstarvinum ESA sigur, at har hava tey framvegis vónir um at fáa samband við "Beagle 2". Samstundis verður gitt, hvat kann vera hent. Colin Pillinger, sum stendur á odda fyri verkætlanini hjá ESA, sigur, at kanska vendir antennan á farinum skeivan veg, kanska er farið lent á skeivum staði, og tann seinasti møguleikin er so, at tað er farið í smildur undir lendingini.

# Kann hava kravt 40.000 mannalív



**Tað eru ikki stundir til at jarða fólk í egnum gravum eftir jarðskjálvtan í iranska býnum Bam. Higartil eru umleið 24.000 funnin deyð, men talið fer kanska at veksa nógv.**

JARÐSKJÁLVTI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tann trý ára gamli Mohammad Assan Rostan Abade var heppin. Sunnukvøldið varð hann funnin á lívi undir húsaleivdunum í Bam. Samstundis minkaðu vónirnar um at finna fleiri á lívi eftir tann ógvusliga jarðskjálvtan.

– Eg vænti ikki, at vit fara at finna mong á lívi afturat, soleiðis sum húsini her vóru bygd. Tey eru jú úr leiri og sandi og eru tí farin í smildur av skjálvtanum, segði finski bjargingarmaðurin Ari Vakkilainen við tíðindastovurnar sunnukvøldið.

Í gøtunum ella tí, sum er eftir av gøtunum í Bam, lógu fleiri hundrað løstað fólk, og í floghavnini var sannur ruðuleiki. Ein partur av floghavnini er gjørdur til sjúkrahús, og fólk í stórum tali leitaðu sær hjálp har.

Samstundis eru umleið 100.000 fólk vorðin heimleys, og hóast umfatandi hjálpartiltøk eru tað framvegis mong, sum ikki hava fingið nakað at sova í tær køldu næturnar.

Í gjár søgdu iransku myndugleikarnir, at umleið 24.000 fólk høvdu latið lív, men samstundis siga teir, at talið á deyðum kann koma upp ímóti teimum 40.000. Víst varð á, at í gjár vóru bjargingarliðini framvegis ikki byrjað at leita í summum pørtum av tí oyðilagda býnum.

Tey, sum verða funnin deyð, verða jarðað at kalla beinanvegin. Av tí at tað er ógjørligt at jarða fólk í egnari grøv, verða fólk løgd í hópgravir, sum gravimaskinur síðani tyrva. Rundanum sita syrgjandi og hyggja at.

– Eg síggi einar fýra lítlar lastbilar koyra lík hvønn einasta minutt, og einar tíggju gravimaskinur hava úr at gera við at grava gravir og at tyrva tær aftur. Millum 300 og 400 lík liggja og bíða eftir at verða jarðað, og í einari serligari røð liggja líkini av nógvum børnum. Eisini tey bíða. Eini 4.000 fólk standa syrgjandi og eygleiða tað, sum fer fram her, segði ein tíðindamaður hjá fronsku tíðindastovuni AFP í gjár.

# Ringasti jarðskjálvtin í tíggju ár

**Jarðskjálvtin í Bam er eftir øllum at døma tann ringasti seinastu tíggju árini.**

JARÐSKJÁLVTI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í gjár kunngjørdu iransku myndugleikarnir, at jarðskjálvtin í Bam hevði kravt umleið 24.000 mannalív. Tað merkir, at skjálvtin er tann ringasti seinastu tíggju árini.

Aðrir ringir jarðskjálvtar seinastu tíggju árini:

- India í januar í 2001: Minst 19.700 deyð.
- Turkaland 17. august 1999: Minst 17.800 deyð
- India 30. september 1993: Næstan 10.000 deyð.
- Japan 17. januar 1995: 6.430 deyð
- Afghanistan 4. februar 1998: Minst 4.500 deyð
- Afghanistan 30. mai 1998: Næstan 4.000 deyð
- Algeria 21. mai 2003: 2.251 deyð.
- Indonesia 12. desember 1992: Minst 2.200 deyð
- Papua Ný-Guinea 17. juli 1998: Minst 2.100 deyð



ítróttur

Nr. 245 • týsdagur • 30. desmber 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Triði føroyingurin í Fremad Amager

**Tað verða vandamestu føroyski álopsmenninir tey bæði seinastu árini, sum komandi árið fara at manna álopið hjá Fremad Amager**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*20 ára gamli Hjalgrím Elttør verður triði føroyingurin í Fremad Amager, og saman við Andrew av Fløtum skal hann royna at loysa trupulleikan, sum felagið hevur havt frammanfyri mótstøðumálunum*

Einki er at ivast í, at flestu fótbóltshugaðu føroyingar fara at fylgja væl við, hvussu gongst hjá Fremad Amager, tá næst besta danska fótbóltsdeildin verður blást ígongd eftir vetrarsteðgin.

Felagið gjørdi í heyst sáttmála við Jann Inga Petersen, og eftir øllum at døma hevur leiðslan í felagnum verið sera væl nøgd við tað, sum ungi toftamaðurin hevur víst. Fyrr í hesum mánaðinum skrivaði felagið sáttmála við Andrew av Fløtum, sum í fjør var toppskjútti í føroysku landskappingini, og nú er so toppskjúttin fyri 2003 eisini komin til felagið.

### Vil aftur í hitan

Talan er sjálvandi um 20 ára gamla klaksvíkingin, Hjalgrím Elttør, sum fyri góðum ári síðani bara var sentimetrar frá at skapa eina risa-sensatión, tá skot hansara tók skeivu megin stólpan hjá Kahn í Hannover.

Hjalgrím kundi mánadagin váttað, at sáttmálin var undirskrivaður, tó at onkrir smálutir enn skuldu fáast upp á pláss, og sjálvur dylir leikarin ikki fyri, at hann er sera spentur, nú ein tilvera sum fulltíðar yrkisleikari bíðar honum.

– Nú hevur tað jú fleiri ferðir verið upp á tal, at eg skal royna meg onkra staðni uttanlands, men higartil er okkurt komið tvørt fyri mest sum hvørja ferð. Fyrr ella seinni noyðist tú tó at taka lopið, og so er tað ikki so umráðandi, akkurát hvat felag talan er um. Fyri meg er tað týdningarmesta, at eg komi til eitt felag, har eg havi góðar møguleikar at mennast sum leikari, og tað ivist eg ikki í, at eg havi í Fremad Amager, sigur hann, og leggur afturat, at tað sjálvandi ikki hevur gjørt valið truplari, at felagið framman undan hevur tveir føroyingar í hópinum.

Og eins og Andrew av Fløtum segði tað fyrr í mánaðinum, so er tað serliga tað at koma út um landoddarnar at royna seg, sum tykist hava eggjað Hjalgrím til skiftið.

– Talan er um eitt av mongu feløgunum í Keypmannahavn, og bara tað í sjálvum sær ger ivaleyst, at nógv meira fokus verður á avrikini hjá mær. Tey bæði størstu donsku feløgini halda eisini til nærhendis, og yvirhøvur fylgja bestu feløgini sera væl við, hvat rørir seg í deildunum beint undir toppinum. Fyri meg hevur tað eisini nógv at siga, at Henrik Larsen býr í økinum, og tí skuldu møguleikarnir hjá mær at endurvinna plássið á landsliðnum eisini verið góðir.

### Fær kjansin

Um møguleikarnar í Fremad Amager at mennast, sigur Hjalgrím, at teir eftir hansara tykki eru góðir.

– Eg havi sjálvandi roynt at ráðført meg við tey, sum kenna til felagið og danska fótbólt, og eftir hetta eri eg ikki í iva um, at eg kann gerast ein betri leikari her niðri.

– Jann Ingi er sjálvandi ein av teimum, sum eg havi tosað nógv við, og hann tykist ikki ivast í, at hetta kann vera eitt gott stig at taka. Støðið er – sum eg havi skilt tað - nakað hægri enn í bestu føroysku deildini, og tí verður talan um harðari dystir, enn eg eri vanur við. At talan eisini er um sterkan leikarahóp gevur eisini nakað í venjingunum, og sjálvt um eg ikki ivist í, at tað verður hart at vinna sær pláss á liðnum, so eigur alt hetta at verða nakað, sum kann gera meg til ein betri leikara. Eisini tí eg soleiðis verði tvungin til at arbeiða við teimum lutum, sum eg kanska ikki eri so stinnur í.

– Eisini spurdi eg Jákup Mikkelsen, sum jú hevur drúgvar royndir sum yrkisleikari, hvat hann helt um hendan møguleikan, og hann segði sjálvur, at har var so einki at ivast í, um eg veruliga ætlaði mær nakað, so alt í alt var avgerðin ikki so trupul at taka.

Spurningurin er so, í hvønn mun Hjalgrím fær spælitíð í felagnum, og um hetta kanska verður í einum reint føroyskum álopi, har hann og Andrew av Fløtum eru makkarar. Tað ber sjálvandi illa til at spáa um í verandi støðu, men tað tykist hinvegin vera lítil ivi um, at teir báðir føroyingarnir fara at fáa møguleikan.

Hóast spælið hjá felagum hevur verið á eini heilt góðari leið, so er liðið bert eitt pláss omanfyri niðurflytingarstrikuna, o g størsti trupulleikin í hesum hevur verið væntandi málskjóting. Tí vil felagið eftir øllum at døma leggja nógv fyri í royndunum at fáa hol á, og tvey av vápnunum í hesum verða so í øllum førum teir báðir fremstu føroysku málskjúttarnir seinastu tvey árini.

Tað er North Atlantic Football Agency við Jákupi í Stórustovu, sum hevur staðið fyri samráðingunum við Fremad Amager, og er hetta soleiðis triðju ferð innan ein góðan ársfjórðing, at Jákup hevur fingið sáttmála í lag við danska felagið.

## Nýggir sáttmálar í B36

Jólaaftansmorgun boðaði B36 umvegis heimasíðu sína frá, at teir nú hava fingið pappír upp á fýra av leikarunum, sum komandi árið skulu styrkja um fyrstudeildarhópin hjá felagnum.

Teir fýra eru Egil á Bø og Ronnie Samuelsen úr EB/Streymi, Arnbjørn Danielsen úr B68 og Jens Erik Rasmussen, sum kemur úr FS Vágum. Teir tríggir fyrstnevndu hava allir fleiri ár á baki í felagnum, meðan tað hjá Jens Eriki verður talan um nýggja uppliving, tá hann fer í hvíta búnan um fáar mánaðir.

Umframt hesar sigur felagið eisini, at talan helst verður um annan styrk til liðið. Sum vit áður hava skrivað, so er Jóhannis Joensen, sum í ár leikti við FS Vágum, ivaleyst ein av teimum, sum felagið fer at knýta afturat hópinum, og hartil hevur tosið kring felagið leingi snúð seg um, at ein nýggjur álopsleikari skal fáast til vega. Leingi sá út til, at talan skuldi gerast um Hjalgrím Elttør, men nú hann tykist mistur, eru eyðuni helst vend aðrar vegir.

Formaðurin í felagnum, Kristian á Neystabø, vil als ongar viðmerkingar gera til hetta, men sum Sosialurin hevur skilt, so hevur B36 seinastu tíðina havt eyguni vend móti Íslandi í hesum royndum.

**-jm**